
Myndir: Jakob Mydtskov

# Thomas Mygind var sera spentur

Thomas Mygind var saman við 30 ára gamla debutantinum Anne Katrine Skole vertur á Kan Du Danse? Eftir finaluna fingu vit orð á kenda og roynda sjónvarpsvertin, sum í nógv ár var vertur á einum ótali á sendingum á TV3, áðrenn hann skifti til Kanal 5, har hann júst er vorðin stjóri á rásini. Thomas Mygind greiddi frá, at hann hevur gjørt umleið 1.500 sjónvarpssendingar, men at Kan Du Danse? var stuttligasta sendingin, ið hann nakrantíð hevði verið vertur á.

– Hetta er fyrstu ferð, at eg arbeiddi saman við einum øðrum verti. Hetta var eg bæði spentur um, og samstundis ræddist eg tað eitt sindur, eisini at skula arbeiða saman við einum heilt óroyndum verti, men tað hevur riggað ótrúliga væl, og Anne Katrine er eitt satt stjørnuskot, segði fryntligi verturin. Hann greiddi frá, at hann í síni tíð, sum vertur á sendingum sum Fangerne På Fortet, Robinson Ekspeditionen og Danmarks Klogeste Barn hevur givið burt vinningar fyri yvir kr. 15 milliónir. Men ongantíð áður hevði hann verið so spentur og havt so nógvar kenslur innblandaðar í handanina av kekkinum, ið gjørdi Vígdis Hentze Olsen kr. 250.000 ríkari.

**nud**









# Eliesar og Jóna vóru ovfarakát

Eliesar Olsen og Jóna Hentze vóru komin til Danmarkar at hyggja at dóttur síni Vígdis, tá hon vann finaluna í Kan Du Danse? Vit fingu orð á ovfarakátu foreldrini og spurdu hvussu hetta kendist?

– Eg eri bæði yvirraskaður og rørdur, eg visti væl, at Vígdis dugdi væl, men tá støðið er so høgt, so er ringt at vita, hvussu tað endar. Vit hava sæð so lítið av hennara dansi, hon flutti heimanífrá 15 ára gomul, og síðan tá hevur hon mest dansa uttanlands, so tað er



stuttligt at síggja hvussu nógv hon hevur ment seg, segði Eliesar.

– Eg haldi at hetta er heilt óveruligt, segði Jóna, ið ikki hevði torað at trú tí, áðrenn avgerðin var tikin. Hon helt serliga, at tað var flott, at Vígdis kláraði hetta í einum so stórum landi sum Danmark og uttan føroyskar sms atkvøður.

Tað sum eg eri mest glað um er, at hon nú sleppur til New York, segði Jóna og helt fram:

– Hetta hevur verið ein dreymur síðan hon var 17, eg misti svøvnin av henni tá. Tá hon ikki slapp tá, so er gott, at hon, nú hon er meira búgvin til tað, sleppur har yvir, segði Jóna.

**nud**

